Sørvágs Kommuna

Kunningarskriv
2009

www.sorvag.fo

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Tað hevur verið siðvenja her í kommununi, at borgarar okkara við árslok fáa eitt kunningarskriv, har greitt verður frá, hvussu skorist hevur í brátt farna ári, og hvørjar ætlanir bygdaráðið hevur í árinum, sum kemur.

Nývalda bygdaráðið tók sum kunnugt yvir við ársbyrjan í 2009. Gamalt er at siga, at eitthvørt stýri byggir á herðarnar á teimum, sum undan eru farin. Fíggarætlanin fyri 2009 var løgd, og sitandi bygdaráð valdi at fylgja teimum raðfestingum, sum undanfarna bygdaráð hevði gjørt.

Fíggjarætlanin 2009

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2009 var ætlanin at gera íløgur fyri 8,9 mió.kr. Høvuðsíløgurnar vóru hesar:

Fólkaskúlin :	kr. 1.300.000
Musikkskúlin :	kr. 2.000.000
Ítróttaranlegg :	kr. 500.000
Vetrarfriðing :	kr. 2.000.000
Byggibúning :	kr. 1.500.000
Vegir :	kr. 1.000.000
Havnir og lendingar:	kr. 500.000

Vetrarfriðingin og byggibúningin fóru við slakari helvt av íløgunum. Byggibúningin snýr seg í skjótt farna ári um at keypa jørð til sethúsabygging. Tað, at keypa jørð, er ikki tað mest áhugaverda fyri nývaldar bygdaráðslimir, men tað er ein neyðug íløga, um kommunan skal mennast, og fólk skulu byggja og búsetast í kommununi.

Fólkaskúlin fekk játtaðar 1.300.000 kr., har stóri parturin av íløguni skuldi fara til at skifta tekjuna á svimjihøllini. Av tí at rættast er at gera hetta arbeiði í summarhálvuni, og útbjóðingartilfarið ikki var tøkt tá, valdu vit at útseta arbeiðið til komandi summar.

Mennesket spår - Gud rår

Hetta orðatakið plagdu tey gomlu at hava fyri munni. Mannaskapta heimskreppan í fíggjarheiminum fór ikki aftur við borðinum hjá okkum uttan ávirkan heldur. Tíðliga í vár hoyrdu vit í fjølmiðlunum, at fleiri

kommunur fóru at endurskoða sínar fíggjarætlanir, tí inntøkan var ikki tað, sum mett varð við árslok.

Í mun til aðrar kommunur hava vit verið heppin hvat A- inntøkum viðvíkir. Í skrivandi løtu kenna vit inntøkuna fyri fyrstu 11 mánaðirnar í árinum.Vit teljast millum tær fýra, sum hava havt inntøkuvøkstur í 2009. Inntøkan fyrstu 11 mánaðirnar í 2008 var 26.671.988 mió. kr. móti 26.839.523 kr.mió.kr.í 2009. Hetta er ein vøkstur upp á 167.535 kr., sum í prosentum svarar til 0,63 prosent. Hvat partafelagsskatti viðvíkir, so er hann slakar 900.000 kr í ár sammett við 1.7 mió.kr árið fyri. Almennar fyritøkur, sum bera bróðurpartin av partafelagsskattinum, hava sostatt kastað nógv minni av sær.

Vinnulívið

Orsøkin til at vit ikki hava havt afturgongd, kemur av, at okkara vinnulív hevur megnað at yvirliva í hesum torføru tíðum. Flogvøllurin, og tað avleidda virksemið, sum er av honum, hevur skapt stabilar inntøkur , eisini í brátt farna ári.

Undanfarna bygdaráð setti sína vón til, at ídnaðarøkið uppi á Hálsi fór at verða karmur um verandi og nýtt virksemi av ymiskum slag. Heimskreppan, fíggingarmøguleikar og dapurskygni, sum kemur í kjalarvørrinum, tá allir pílar venda niður, hevur gjørt, at áhugin fyri økinum ikki hevur verið tann stóri í árinum, sum brátt er farið, men eingin ivi er um, at eydnast tað at fáa flogvøllin longdan til 1800 metrar, so upprennur tann dagur,tá økið aftur verður áhugavert. Allastaðni í heiminum hevur flogvøllur, ídnaðarøki og bryggjukantur skapt avleidd arbeiðspláss í tí umhvørvi, har tey liggja. Treyðugt so eru tveir bygningar bygdir á økinum, og eitt grundøki er selt.

Bryggjan og sjógvurin

Virksemið á bryggjuni hevur verið stórt í árinum, sum brátt er farið. Í tíðindaskrivinum í fjør stóð, at Kallsevni og Grímur Kamban stevndu inn eftir vágni í mai mánaði í fjør. Og meðan táverandi borgarstjórin sat og evnaði árliga kunningarskrivið til, kom stóri trolarin Brestir grøvandi inn eftir fjørðinum og legðist við bryggju. Tummas Henriksen, sum áður, saman við øðrum, hevði keypt Beinir frá Aksel Hansen, og givið honum

navnið Vesturleiki, skuldi vera útgerðarmaður hjá hesum trimum trolarunum, sum komnir vóru til bygdar.

Í árinum, sum brátt er farið, hevur felagið, sum børnini hjá Jósup Henriksen, sála, eiga, saman við øðrum keypt allar tríggjar trolararnar. Og teir bera nú allir VA á bógnum og hava fingið kendu nøvnini um okkara leiðir á hekkuna, nevniliga Vesturvarði og Vesturskin.

Um gongdina hjá skipunum í skjótt farna ári, sigur reiðarin, Tummas Henriksen, at tað kundi gingið betur, men tað kundi eisini gingið verri. Latið okkum vóna, at hetta er nóg gott til framhaldandi rakstur.Vit fara í øllum førum frá hesum stað at ynskja reiðaríi, skipara og manning blíðan byr og gott fiskarí í árinum, sum kemur.

Landingarmiðstøðin

Trolararnir hava eisini stóra ávirkan á virksemið á landi. Teir hava m.a. brúk fyri olju, umvælingum og ísi. Alt hetta skapar ringvirkningar og arbeiði, sum vit øll fegnast um. Landingarmiðstøðin tók ímóti 3800 tonsum í 2007, 5000 tonsum í 2008, og væntandi tekur miðstøðin ímóti

7000 tonsum í 2009. Í skrivandi løtu harmar tað meg, at Vinjard Joensen sáli, ikki skuldi uppliva, at stóri dreymur hansara um, at tað bar til at hava eina landingarmiðstøð í Sørvági til fulnar gjørdist veruleiki.

Luna

Síðsta heyst flutti Luna virksemið úr gamla flakavirkinum út í bláa bygningin úti á bryggjuni. Luna er kryvjivirki, sum hevur laks gangandi í Gøtu, Miðvági og Sørvági.Virksemið er skipað soleiðis, at triðja hvørt ár verður laksurin tikin av tí firði, hann gongur í, og fórdur til kryvjivirkið í Sørvági. Í ár og fram til summarfrítíðina næsta ár verður tikið úr aliringunum, sum liggja á Sørvágsfirði. Tá verða ringarnir sleipaðir inn til tøkubúrini, sum eru fest í bryggjukantin, og laksurin verður pumpaður beinleiðis inn á virkið.

Tá Luna avgjørdi at hava sítt virksemi her, var bert ein trolari í bygdini. Tað einasta vit høvdu nokk av, var bryggjukantur. Avtala varð tá gjørd um, at teir kundu hava landstøð á vestara enda á bryggjuni. Girðing skuldi gerast um økið, og almenningurin hevði onga atgongd, sambært krøvum frá myndugleikunum. Eisini varð avtala gjørd um, at virkið triðja hvørt ár kundi brúka 50 metrar av bryggjukantinum til tøkubúr.

Í ár hendi tað gleðiliga, at vit hava havt ov lítið av bryggjukanti. Heitt varð á Luna um at flyta landstøðina heim á træbryggjuna, har gamla flakavirkið kundi verðið brúkt sum landstøð. Hesum ynski gekk felagið ámøti, og nú er træbrúgvin partur av teirra landstøð, og skip kunnu brúka vestara enda av bryggjuni sum atløgusíðu.

Sjálvt um tað tíðum hevur verið trongligt á bryggjuni ávísar dagar, so fegnast vit um, at við góðum samstarvi hava øll kunnað verið har.

Í 2008 vórðu 4300 tons kruvd á virkinum, og í 2009 er nøgdinn 4600 tons. Á firðinum ganga 650.000 laksar, sum fara at vera um 3500 tons, tá liðugt er at taka. Komandi ár rokna tey á Luna við at kryvja 5500 tons, um alt gongur eftir ætlan.

Planting

Nógv her í lívinum gongur í bylgjum. Fyri meira enn hálvthunrað árum síðani høvdu vit her í bygdini ein bygdaráðslim, Petur Weiha, sála, sum hevði serligan tokka til plantuvøkstur. Hann fekk samband við danskan plantuskúla, sum gav kommununi ymisk sløg av trøum. Nógv av teimum stóru trøunum, vit síggja runt um í bygdini, eru úrslit av tí samstarvinum.

Hesin táttur varð tikin upp aftur her í kommununi fyri nøkrum árum síðani. Í 1993 vórðu fyrstu trøini gróðursett í skúlagarðinum, sum tey ungu siga í dag. Síðani hevur hvør einasti næmingur, sum er komin í skúla, plantað sítt egna træ. Tað er at frøast yvir, at tað, sum er gróðuesett, fær so góðan frið. Uttan iva er tað tí, at tey gerast góð við sítt egna, og at tey hava kenslur fyri tí, sum systkin ella onnur, tey kenna hava plantað. Skulu vit hava hugburðsbroytingar, so er rættast at byrja við ungdóminum.

Umsjónin á skúlanum hevur eisini verið so skilagóð, at hvørt einasta træ er skrásett soleiðis, at tað fæst at vita, nær træið er gróðursett, hvør eigur tað, og hvat træið ella runnurin eitur.

Vit finnast ofta at okkara ungdómi. Einki fær frið, verður ofta sagt. Vit kunnu við takksemi staðfesta, at tað, sum gróðursett er her í kommununi, hevur fingið frið.Tøkk skulu tit hava fyri tað.

Og júst tað, at tað, sum verður gróðursett, fær frið, hevur givið bygdaráðnum orsøk til at raðfesta hetta økið. Síðstu fimm árini hava borgarar í kommununi fingið umleið 6000 trø ella runnar. Kemur bara ein brotpartur av hesum fyri seg, so verður tað ein fragd fyri eygað, samstundis sum vit eru við til at minka um koltvíiltina í lofthavinum, sum í ringasta føri kann gera av við mannaættina.

Grøna skjalið

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundi 26.februar 2009 “Yvirlýsing fyri arbeiði hjá kommunum fyri burðardyggari menning”, nú nevnt Gøna skjalið.

Grøna skjalið snýr seg í høvuðsheitum um at tryggja lívsgrundarlag fyri núverðandi og komandi ættarliðum.

Fíggjarætlanin 2010

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2010 er ætlanin at gera íløgur fyri 9.9 mió.kr. í 2010.

Høvuðsíløgurnar eru hesar:

Musikkskúlin	3.188.000
Svimjihøllin	1.000.000
Fríðkan í kommununi	1.169.000
Byggibúning	2.640.000
Vatnveiting	500.000
Havnir og lendingar	700.000
Fólkaskúlin	400.000
Barnaansing	114.000

Íløgan til musikkskúlan er til liðugerð av skúlanum, og íløgan til svimjihøllina er til at skifta takið út. Íløgan í fríðkan í kommununi fer í høvuðsheitum til grótlaðing og arbeiði, sum er knýtt at tí.

Viðvíkjandi byggibúning fer íløgan til parkeringspláss niðan fyri gamla svimjihylin og keyp av jørð. Hagagerðið og Billubøurin fáa eisini sín lut í íløguni.

Kommunan hevði seks grundøkir byggibúgvin í Billubønum. Av teimum eru í skrivandi løtu fimm um at vera seld, so har er bara eitt eftir.

Í vestara parti í Hagagerði eru trý grundøkir, sum kommunan eigur óseld. Her hevur bygdaráðið samtykt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, og einki av hesum verður selt, fyrr enn tey viðurskiftini eru í lagi.

Áhugin at byggja er framvegis stórur, og tí verður neyðugt at halda fram við útstykkingum í Billubønum.

Bygdaráðið hevur sett sær fyri, at allar bygdirnar í kommununi skulu hava sóttreinsað vatn í hesum valskeiðnum. Vatnið í Sørvági og Mykinesi er í lagi, so nú eiga Bøur og Gásadalur tørn.

Viðvíkjandi upphæddini til havnir og lendingar, so hevur undanfarna bygdaráð roynt at skift út hvørt ár nakrar armar, sum eru festir í brýrnar, og sum bátarnir liggja ímillum í báthylinum. Teir eru nógvir, men við at skifta einar tíggju um árið, so koma vit um ikki so langa tíð har til, at allir armarnir eru nýggir. Ætlanin hevur eisini verið at hampa um uttara armin á bátahylinum.

Eftir eru tvær upphæddir til skúlan og barnagarðin. Hesar verða nýttar til íløgur, sum leiðsla og starvsfólk halda vera skilabest.

Umframt íløgur hevur bygdaráðið sett á fíggjarætlanina 2.6 mió.kr til rakstur av vegakervinum. Ætlanin er, at Ovarivegur skal fáa sín bróðurpart, meðan ein partur fer til asfaltering í kommununi.

Mykines er í teirri serstøðu, at hon er útoyggj. Útoyggjar kunnu fáa stuðul til ymisk átøk, sum verða fíggjað av konto á fíggjarlógini, sum eitur stuðul til infrakervið á útoyggj. Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið tær stóru upphæddirnar av hesi konto, men í ár er rekkverk gjørt oman til lendingina. Eisini skal Landsverk hava eina ætlan um alternativan tyrlupall klára fyri árslok. Vit hava umsókn um ymiskar ábøtur í oynni til komandi fíggjarár.

Byggisamtyktir og kloakering

Almennu myndugleikarnir hava álagt kommununum at skráseta allar kloakkir í komandi ári, og at hava eina ætlan, soleiðis, at onki spillvatn verður leitt út í áirnar í 2015. Hetta er stórarbeiði, sum eisini fer at verða kostnaðarmikið fyri okkara kommunu, sum hevur so spjadda búseting.

Eisini hava almenninr myndugleikar álagt kommununum at hava almennar býarskipanir og byggisamtyktir, sum skulu vera myndugleikunum í hendi við árslok 2010. Vit hava byggisamtykt fyri Sørvág, men ikki fyri Bø, Gásadal og Mykines. Hetta arbeiðið verður eisini gjørt í komandi ári.

Fíggjarætlanin 2010

Fyri at fíggja rakstur og íløgur hevur kommunan eina fíggjarætlan, sum verður samtykt fyri 1.november á hvørjum ári. Bygdaráðið samtykti við 2.viðgerð fíggjarætlanina fyri 2010 á regliligum fundi 25.november 2010. Høvuðstølini á fíggjarlógini eru:

Rakstur	25.390.000
Inntøkur	29.830.000
Til íløgur	4.440.000

Bygdaráðið hevur samtykt at gera íløgur fyri 9.940.000 kr í komandi ári. Sostatt má munurin millum 9.940.000 kr. og 4.440.000 kr. = 5.500.000 kr. fíggjast við lántøku ella av tøkum peningi. Bygdaráðið hevur valt at læna peningin. Fíggjarætlanin javnvigar sostatt við 35.330.000 kr.

Tað var full semja í bygdaráðnum um at framskunda nakrar íløgur, sum høvdu tolt at bíða undir vanligum umstøðum. Arbeiðsloysið er vaksandi, og í slíkum tíðum eigur tað almenna at gera íløgur, um tað er møguligt. Tí valdu vit at gera íløgur, sum lutvíst verða fíggjaðar við láni, og hækka skattaprosentið frá 20.5 % til 21.0 %. Okkara skattaprosent liggur undir tí, sum miðalstórar kommunur hava, og lægri enn tað, sum næstu grannarnir hava. Barnafrádrátturin verður óbroyttur í komandi ári.

Fíggjarstøðan

Við árslok er langfreistaða nettoskuldin hjá kommununi 3 mió.kr. Sørvágs kommuna kann, uttan at spyrja landsstýrið eftir, skylda eina álíkning við 23 prosentum, sum svarar til umleið 32 mió.kr. Vit hava fingið tilsøgn um 5.5 mió.kr.frá peningastovnunum til íløgurnar komandi ár, og hendir einki óvæntað, so verður nettoskuldin við árslok komandi ár 8.5 mió.kr.

Vit kunnu altíð kjakast um, hvussu stór kommunuskuldin eigur at vera. Fyri nøkrum árum síðani høvdu fleiri kommunur onga skuld, men áhaldandi tosið um at leggja kommunurnar saman við lóg hevur gjørt, at fleiri hava lánt seg upp til eina álíkning ella meira. Tær vóru ikki sinnaðar at fara inn í nýggja hjúnarlagið við stórari heimanfylgju, sum sagt verður millum kommunustýrislimir.

Fundir og mál

Bygdaráðið hevur havt 16 bygdaráðsfundir í 2009. Íalt 184 mál hava verið til viðgerðar.
Tað málið, sum hevur havt størsta almenna áhugan, er leingingin av flogvøllinum. Í samband við byggingina eru fýra myndugleikar inni í

myndini. Teir eru Umhvørvisstovan, Náttúrufriðingarnevndin, Yvirfriðingarnevndin og Sørvágs kommuna. Hvør av hesum myndugleikum hevur síni atlit at taka.

Bygdaráðið viðgjørdi umsóknina um leingingina á fundi 2.september 2009 og gav tá fyribils góðkenning. Endaliga avgerðin var tikin á fundi mikudagin 9. desember. Sostatt er málið avgreitt frá bygdaráðsins síðu.

Í sambandi við málsviðgerðina hava fundir verið millum Vága Floghavn og Sørvágs Bygdaráð. Uttan at fara út í nakra politiska viðgerð av málinum í hesum kunningarskrivi, so er bygdaráðið sannført um, at verður vøllurin ikki longdur til slakar 1800 metrar, so verður ikki friður um vøllin. Og júst friður er tað, vit hava brúk fyri,um einstaklingar og fyritøkur skulu tora at gera íløgur.

Medaljan ella heiðursmerkið hevur altíð tvær síður. Uppskotið hjá nevndini fyri Vága Floghavn og landsstýrismanni er at leingja vøllin 350 m eystureftir og 199 m vestureftir. Givið er, at flest øll høvdu viljað havt vøllin longdan 549 m eystureftir. Men kostnaðurin av hesi íløgu hevði verið so høgur, at uppskotið hevði ikki havt ein livandi møguleika. Tí mugu vit liva við, at vøllurin verður longdur 199 m móti bygdini.

Fólkatalið

Tá bygdirnar í vestara part av oynni vórðu lagdar saman í 2004 vóru 1084 fólk í samanløgdu kommununi. Við árslok 2008 var fólkatalið 1137 fólk,

meðan íbúgvaratalið við árslok í ár er 1140 fólk. Býtið millum bygdirnar sær soleiðis út:

Sørvágur	1027
Bøur	74
Gásadalur	23
Mykines	16

Leysgangandi djór

Ampin av leysgangandi djórum er vorðin stórur í bygdum okkara. Tað gongur næstan ikki ein vika, uttan at borgarar venda sær til umsitingina og klaga um leysgangandi djór. Tey eru ikki áhugað í at fáa grannaklandur av einum hundi. Tað sama er galdandi við hestum og gásum. Vit hava fyrr í ár kunngjørt, at hundar ikki mugu ganga leysir uttan uppsýn.

Viðvíkjandi vetrarfriðingini er tað soleiðis, at frá 24.oktober til 15.mai skal hvørki ross ella seyður verða á tí bøi, sum er vetrarfriðaður. Vit fara at heita á okkara borgarar at taka hesi viðurskifti til eftirtektar.

At enda

Tá tygum sita við hesum kunningarskrivi, er farið um stytsta dag. Tá gongur rætta vegin, og ljósið fer at sigra á myrkrinum.Og við hesum fari eg vegna bygdaráð og umsiting at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár, við tøkk fyri tað brátt farna.

Sørvági, 18.desember 2009

Vinaliga

Sørvágs Kommuna

Sune Jacobsen
Borgarstjóri

Roknskapur 2008

	Nota	Roknskapur Útreiðslur	Roknskapur Inntøkur	Fíggjarætlan Útreiðslur	Fíggjarætlan Inntøkur
Rakstur:					
Byggibúning	1	191.374	14.979	*148.000*	*30.000*
Kommunal virki	2	2.215.149	1.103.933	*1.914.793*	*1.054.400*
Teknisk mál	3	4.666.407	38.892	*4.165.340*	*25.000*
Skúla- og mentunarmál	4	5.221.933	315.546	*4.735.939*	*310.738*
Almanna- og heilsumál	5	9.940.639	2.639.531	*9.452.404*	*2.860.794*
Kommunala fyrisitingin	6	5.342.988	1.260	*4.207.506*	*500*
Rakstur samanlagt		**27.578.490**	**4.114.141**	***24.623.982***	***4.281.432***
Íløgur:					
Byggibúning	7	5.451.534	1.897.980	*5.234.000*	*3.640.000*
Kommunal virki	8	2.831.433		*2.382.000*	
Teknisk mál	9	2.936.398	50.000	*2.807.000*	
Skúla- og mentunarmál	10	1.538.845		*2.150.000*	
Almanna- og heilsumál	11	651.233		*872.000*	
Kommunala fyrisitingin	12	175.644		*116.800*	
Íløgur samanlagt		**13.585.087**	**1.947.980**	***13.561.800***	***3.640.000***
Fíggjarpostar:					
Rentur	13	247.009	428.237	*100.000*	*150.000*
Fíggjarpostar samanlagt		**247.009**	**428.237**	***100.000***	***150.000***
Avdráttir av láni	14	**0**	**0**	***0***	***0***
Samanlagt		**41.410.586**	**6.490.358**	***38.285.782***	***8.071.432***
Lántøka	14		7.132.051 L.		
Broyting í likvidum	15		1.535.103 Peng		*2.967.214*
Aðrar fíggjarbroytingar	16	3.243.264		*0*	*133.954*
Fíggjarbroytingar samanlagt		**3.243.264**	**8.667.154**	***0***	***3.101.168***
Skattur	17	**1.695.779**	**31.192.117**	***780.000***	***27.893.182***
Fíggjan samanlagt		**4.939.043**	**39.859.271**	***780.000***	***30.994.350***
Javnvág		**46.349.629**	**46.349.629**	***39.065.782***	***39.065.782***

Fíggjarætlan 2009

Sørvágs kommuna

Yvirlit

Sune Jacobsen
Borgarstjóri

Høvuðsyvirlit

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan **2010**

Túsund kr.		Rekstrarætlan Útreiðslur	Rekstrarætlan Inntokur	Lógarætlan
§ 1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.043**	**-**	**50**
11.	Felagsútreiðslur	3.043	-	50
§ 2.	**Almanna- og heilsumál**	**2.673**	**-**	**130**
20.	Heilsumál	1.044	-	130
21.	Almannamál	1.629	-	-
§ 3.	**Bara og ung**	**5.923**	**-**	**114**
26.	Barnaansing	5.923	-	114
§ 4.	**Undervising**	**3.379**	**-**	**600**
23.	Útbúgving og gransking	3.379	-	600
§ 5.	**Mentan og frítíð**	**1.790**	**-**	**4.188**
23.	Útbúgving og gransking	434	-	3.188
24.	Mentan	1.356	-	1.000
§ 6.	**Teknisk mál**	**4.839**	**-**	**4.159**
11.	Felagsútreiðslur	640	-	1.169
22.	Íbúðarmál	-	-	2.290
24.	Mentan	99	-	-
30.	Umhvørvi	925	-	500
37.	Handil og vinna annars	-	-	-
38.	Samferðsla og samskipti	3.176	-	200
§ 7.	**Kommunal virki**	**2.026**	**-**	**700**
30.	Umhvørvi	1.763	-	-
31.	Tilbúgving	433	-	-
38.	Samferðsla og samskipti	-170	-	700
Tilsamans		**23.672**	**-**	**9.940**
§ 20.	22. Íbúðarmál	1.000	-	-
§ 20.	50. Rentur	718	260	-
§ 20.	52. Skattir og avgjald	-	29.570	-
Tilsamans		25.390	29.830	9.940
Yvirskot		-	4.440	-
Rekstrar-, lógu- og útlánsætlan RLÍ:		-	**-5.500**	-
§ 25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	0	-
Nettokassaúrslit		-	**-5.500**	**-5.500**
§ 25.	62. Afturgjald av skuld	0	-	-
Bruttokassaúrslit		**0**	**-5.500**	**-5.500**
Figging:				
§ 25.	64. Útvegan av gjaldfíó	-	5.500	-
Figging ialt:		-	5.500	5.500
Samanlagt		**0**	**0**	-

Bygdaráðsfundir 2010

Bygdaráðið hevur ásett førstu bygdaráðsfundirnar fyri 2010.
Fundirnar verða kl. 1800 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar:

Mikukvøldið	27. januar 2010
Hóskvøldið	25. februar 2010
Hóskvøldið	25. mars 2010
Mikukvøldið	28. apríl 2010
Mikukvøldið	27. mai 2010
Mikukvøldið	30. juni 2010
Mikukvøldið	01. septembur 2010
Mikukvøldið	29. septembur 2010
Mikukvøldið	27. oktobur 2010
Mikukvøldið	10. novembur 2010
Mikukvøldið	24. novembur 2010
Mikukvøldið	08. desembur 2010

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar fyri fundin.
Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í svørtutalvu á kommunuskrivstovuni.

Sørvágs Kommuna
Varðagøta 8
Fo-380 Sørvági